## Fleiri læknar í OECD

Tað er rættiliga misjavnt, hvussu nógv fólk eru til hvønn kommunulækna í teimum ymsu OECD-londunum, men ein nýggj kanning staðfestir, at sum heild eru færri fólk til hvønn lækna nú enn fyri tjúgu árum síðani. Kanningin vísir, at serliga grikkar hava lætt við at fáa orð á læknan, tí har eru 5,4 læknar fyri hvørji 1.000 fólk, og tað er meiri enn nakra aðrastaðni, sigur OECD. Men kanningin vísir eisini, at talið á eldri læknum veksur skjótt. Eitt nú er tað tvífaldað í Svøríki. Danmark er á odda í einum, og tað er at útbúgva læknar. Í 2007 klaktu teir lærdu háskúlarnir í Danmark 21,7 læknar fyri hvørji 100.000 fólk, og tað er tað mesta í øllum OECD, sigur DR.



## Vón fyri kjarnorkusáttmála

Alt bendir á, at USA og Russland fara at gera stór framstig í samráðingunum um ein nýggjan kjarnorkuvápnasáttmála, tá forsetarnir, Barack Obama og Dmitrij Medvedev, hittast í Moskva í næstu viku. Alment hava stjórnirnar í Washington og Moskva ikki sagt nakað um útlitini, men diplomatar vænta, at Obama og Medvedev fara at semjast um at skerja kjarnorkuløðingarnar, so tey bæði londini skulu hava minni enn 1.700 løðingar í part. Á fundinum í Moskva skulu teir báðir forsetarnir eisini tosa um Afghanistan. Eitt nú vil USA sleppa at flyta vápn og aðra hernaðarútgerð ígjøgnum Russland til NATO-herdeildirnar í Afghanistan.

# Góð kalvaseta

**Tveir mans vóru í gjár norðan fyri Mykines við kalvalínu, og fongurin var tilsamans 12 kalvar, sum vigaðu um 400 pund**

KALVAVEIÐA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er nógv, sum bendir á, at í hvussu er kalvin ikki er heilt útdeyður um okkara leiðir.

Í síðstu viku var ein maður í Vágsbotni og seldi kalva, og aftur í dag vóru ikki færri enn tveir mans á fiskatorginum í vágsbotni, og teir seldu báðir kalva.

Vit fingu orðið á annan teirra.

- Eg var sjálvur annar við kalvalínu í gjár. Vit høvdu 14 línur við umleið 45 húkum á hvørjari, greiðir maðurin frá.

Og fongurin var góður. Teir báðir fingu ikki færri enn 12 kalvar, sum tilsamans vigaðu um 400 pund. Hin størsti lá um 100 pund.

Veðrið var gott. Vit settu nakað norður úr Pollinum í Mykinesi, sigur kalvamaðurin.

Hann fílist tó á umstøðurnar á nýggja og at síggja til fína fiskatorginum í Vágsbotni.

- Tað er týðiligt, at tað er onkur arkitektur, sum stendur aftan fyri hetta. Fyri tað fyrsta eru stabbarnir gjørdir úr flísum, og fyri tað næsta er eingin kantur á. Tað merkir, at tú fyri tað fyrsta ikki fær spulað uttan at gera øll fólk vát, sum standa rundan um teg, og fyri tað næsta er tað nærum ógjørligt at fáa kalvan at liggja á kubbunum, sigur kalvamaðurin.

Hann sigur, at tað heilt klárt skuldi verið nýtt rustfrítt stál í staðin fyri, og so skuldi bæði kantur verið á og rist í, so at tú kundi ekkaleysur spula sølustaðið, samstundis sum tær ikki nýttist at óttast fyri, at kalvin gleið niður á keiina.

Men saman um tikið mundi kalvamaðurin kortini vera nøgdur um dagin og søluna, ið tóktist at ganga sera væl.



*Ein góður kalvadagur. 12 vóru teir í tali og vigaðu um 400 pund tilsamans*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Heldur størri virksemi enn fleiri sparingar

**-Tað loysir ongar trupulleikar at skava eina millión av her og eina aðra har. Politikararnir eiga heldur at seta verkætlanir í gongd fyri at fáa størri inntøkur, sigur Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgtingsmaður, landsstýrismaður og fyrrverandi løgmaður**

BÚSKAPUR

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tann politiska støðan í Føroyum er ikki góð. Tað sigur Jógvan Sunjdstein, fyrrverandi løgtingsmaður, landsstýrismaður og løgmaður, við Rás2. Hann heldur lítið um, at landsstýrið og samgongan sita og royna at fylla ein kreppupakka við at spara eitt sindur her og eitt sindur har, tí eftir hansara tykki er tann leiðin fullkomiliga skeiv.



*- Landsstýrið eigur at seta arbeiðir í gongd heldur enn at spara eina millión her og eina har, sigur Jógvan Sundstein, fyyverandi løgtingsmaður, landsstýrismaður og løgmaður*

- Tað mest áleikandi er, at peningastovnarnir virka, sum teir skulu, soleiðis at vinnulívið og fólk annars fáa normal umstøður, tá tað snýr seg um at fáa figging til tað, teimum tørvar, sigur Jógvan Sundstein. Hann er samdur við eitt nú stjóranum á Hagstovuni um, at politikararnir eiga at økja inntøkurnar heldur enn at spara nakrar krónur á hvørjari kontu á fíggjarlógini.

### Kósavirkið

Eitt arbeiðspláss, sum sambært fyrrverandi løgmanninum hevði munað tann rætta vegin, er Kósavirkið í Klaksvík. Tað hevur staðið stilt í fleiri mánaðir, og Jógvan Sundstein heldur, at tað liggur ein stór ábyrgd á Føroya Banka, sum eigur virkið, at fáa tað aftur í gongd.

- Tað ber ikki til, at ein peningastovnur liggur og bølir oman á einum so stórum virki, sigur Jógvan Sundstein.

Hann vísir á, at umframt at skapa mong arbeiðspláss hevði avgerðin at lata Kósina uppaftur økt kappingina um fiskin, og tað hevði so havt við sær, at fiskaprísurin batnaði, so at fiskimenn og útgerðarfeløg høvdu fingið meiri burturúr og harvið eisini samfelagið.

### Arbeiðsskapandi tiltøk

Jógvan Sundstein mælir eisini landsstýrinum og samgonguni til at fremja fleiri av teimum stóru verkætlanunum, sum eru klárar, so arbeiðið verður til fleiri hendur frameftir. Sum dømi nevnir hann arbeiðið at byggja flogvøllin í Vágum út og tey ætlaðu røktarheimini í Havn, Klaksvík og aðrastaðni. Og harafturar heldur hann, at nú er tann rætta løtan at fara undir Skálafjarðartunnilin heldur enn at bíða nøkur ár, til búskapurin aftur er heitur.

- Slík stórarbeiði høvdu forðað tí veksandi arbeiðsloysinum, økt inntøkurnar hjá landi og kommunum og bøtt um javnvágina á fíggjarlógini. Sjálvandi er tað álvarssamt við eini 700 milliónum krónum í halli á fíggjarlógini, men tað er skilabetri at fáa tað burtur við meirinntøkum heldur enn við sparingum her og har, tí tað hjálpir ikki, sigur Jógvan Sundstein við Rás2.